

- *Ólavsøkan er ein hátíð, sum vit kunnu njóta á okkara hátt, sigur dómprósturin Uni Næs, sum í ár skal halda ólavsøkuprædikuna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nógv kann sigast millum reglurnar

**Dómprósturin Uni Næs kundi ikki funnið upp á at hartað politikararnar, nú hann hevur teir allar frammi í kór til eina gudstænastu. Ólavsøkuprædikan skal verða savnandi, men tað ber eisini til at siga nógv millum reglurnar, heldur hann**

**Eyðun Klakstein**

Uni Næs og familjan eru júst flutt úr Fuglafirði til Havnar at búgva. Seinnu árini hevur Uni Næs røkt præstaembætið í Fuglafjarðar prestagjaldi, men síðani 1. februar hevur hann verið dómpróstur, og nú er Uni Næs fluttur til Havnar at búgva, har starvið hjá honum eisini er.

Og á ólavsøku stendur hann fyri tørni at halda ólavsøkuprædikuna, tá ið prestar, politikarar, embætisfólk og onnur savnast í Dómkirkjuni til hátíðarliga løtu, áðrenn løgtingið verður sett og fer undir nýtt tingár.

- Rákið í samfelagnum hevur verið, at tað kemur meira og meira skilnaður millum kirkjuna og politiska valdið, men á ólavsøku savnast vit til eina felags gudstænastu, og tað er ein góður siður, sum eg rokni við fer at verða galdandi í nógv ár frameftir, sigur Uni Næs.

- Gudstænastan á ólavsøku er eitt slag av tjóðargudstænastu, og hon er ikki bert fyri fólkakirkjuna og politikarar, hon er fyri alla tjóðina í breiðastu merking. Gudstænastan er ein samansjóðing og ein staðfesting av, at vit eru ein kristin tjóð.

## Einki prik

Uni Næs fyrireikar í løtuni prædikuna, sum hann skal halda fyri politikarunum og fólki annars ólavsøkudag.

- Eg gangi og hugsi um tað, sum eg skal siga, og eg skrivi mær notatir. Sjálva prædikuna skrivi eg móti endanum, sigur hann.

Onkuntíð hava prestar í ólavsøkugudstænastuni givið politikarunum okkurt prikið, men tað ætlar Uni Næs ikki.

- Eg kundi ikki funnið upp á at harta politikararnar, tá teir koma í kirkju á ólavsøku. Eg havi stóra virðing fyri teimum, sum eg prædiki fyri, og eg havi ongantíð undirmett meiningheitina. Tað ber til at siga nógv millum reglurnar, men tú mást altíð minnast til at hava ein virðiligan dialog, sigur Uni Næs.

- Eg haldi tó, at tað er týdningarmikið at fáa tann evangeliska boðskapin út, uttan at tað er ivi um hann.

## Lívsjáttandi hátíð

Hóast summi hava hug at finnast at tí verðsliga partinum av ólavsøkuhaldinum, vil Uni Næs ikki gera tað. Hann velir heldur tann positiva vinkulin upp á ólavsøkuna.

- Tað er lívsjáttandi sum nakað, tá ið fólk savnast á ólavsøku og hugna sær. Fólk seta hvørjum øðrum stevnu í Havn, mentanarlívið blómar, og blíðskapurin er stórur. Hetta ger lívið vert at liva. Tað kristiliga spælir eisini sín leiklut á ólavsøku, sum er eitt slag av hæddarpunkti til gaman og álvara, sigur Uni Næs.

- Sumi halda, at kristindómurin er keðiligur, gráur og lívskøvandi, men tað haldi eg als ikki. Kristindómurin er lívsjáttandi, og hann snýr seg eisini um at hava tað gott saman við okkara nærmastu. Kristindómurin er altíð í relatión til næstan.

- Eg vil ikki moralisera yvir ólavsøkuhaldið, eg velji heldur tann positiva vinkulin, og eg haldi, at ólavsøkan er haldbar, tí hon bjóðar nakað til tað andliga og tað verðsliga. Ólavsøkan er ein hátíð, sum vit kunnu njóta á okkara hátt, sigur Uni Næs.